# KVINNUR VIÐ VÓN

## *Bønaráheitanir oktober 2024 - Miðasia, Norður Afrika og Miðeystur*

1. Gud, vit biðja, at kvinnur, ið fáast við okkultismu í Karakalpakstan, finna frelsu og gerast frælsar í Kristusi, og venda sær til Tín at fáa styrki í Tær. (3.Mósebók 19:31)
2. Harri, gev ungum tadsjikistum gentum, sum eru tvingaðar at giftast móti vilja sínum, vón og styrki, og eisini kvinnum, sum mugu gerast onnur ella triðja kona hjá monnum við fleiri konum fyri at yvirliva. (1.Pætursbræv 3:7)
3. Takk, Faðir, at fólk, ið hoyra til annan átrúnað, lurta eftir sendingum okkara í Kirgisia. Lat sannleika Tín seta tey í frælsi og veita familjunum signingar frá Tær. (Jóhannesar Ev. 8:32)
4. Harri, hjálp einligum mammum í Kasakstan at fáa møguleika at arbeiða, so tær kunnu forsyrgja sær og familjuni í reiðiligum starvi. (Kolossebrævið. 3:23)
5. Faðir, vit biðja Teg um at varðveita og hjálpa kvinnum í Jordan, ið eru flóttafólk. Leið tær til Tín at finna vón, frið og støðufesti sum tær búsetast í sínum nýggja umhvørvi. (Matteus 11:28)
6. Harri, vit biðja, at Tú mást finna teimum trúgvandi í Turkmenistan ein útveg at kunna savnast saman í húsbólkum og halda fram í trúnni, hóast tey fáa mótstøðu frá vantrúgvandi. (Ápostlasøgan 2:42)
7. Gud, vit biðja, at foreldur í Usbekistan leita til Tín at fáa vísdóm, so tey kunnu ala børn síni upp eftir Orði Tínum. (Orðtøkini 22:6)
8. Harri, vit biðja Teg um at varðveita kvinnur í Egyptalandi og í Tunesia, og hjálpa teimum, ið uppliva harðskap orsakað av kyni og innanhýsis harðskap og misnýtslu í aðramátar. (Sálmur 9:10; ensk: 9:9)
9. Faðir, vit biðja Teg um at fyrireika kirkjur og samkomur at vera eitt friðskjól hjá niðurboygdum kvinnum í Norður Kýpros, har tær kunnu finna vón. (Sálmur 147:3)
10. Vit biðja fyri teimum kristnu í Turkalandi, ið verða álopin vegna trúgv sína. Harri, vilt Tú geva brøðrum og systrum okkara dirvi og frið eins og Dániel, og verja tey frá øllum "leyvum". (Dániel 6:23; ensk 6:22)
11. Gud, vit biðja, at talgildu pallarnir hjá toymi okkara í Miðeystri trygt og áhaldandi kunnu nýtast. Veit toymum okkara vísdóm og vælvild í royndini at knýta samband við lurtararnar. (Sálmur 90:17)
12. Harri, brót Tú andaligu forðingarnar hjá fólkinum í Usbekistan, og hjálp teimum at skilja og standa ímóti svikaálopum Satans við dirvi og støðufesti. (Jákupsbræv 4:7)
13. Faðir, styrk og verj kvinnur í Bahrain, ið eru undir samfelagsligum trýsti og mismuni orsakað av síni kristnu trúgv. (Sálmur 27:1)
14. Gud, vit biðja, at Tú vilt bøta um sambandið millum vermøður og verdøtur í Karakalpakstan, so at tær góðtaka og elska hvørja aðra. (2. Korintbræv 13:11)
15. Faðir, lat kvinnur í Sýria koma at kenna kærleika og frið Kristusar mitt í øllum ruðuleikanum, har bardagar fara fram í landinum. Troysta tey, ið syrgja; verj og síggj til tey, ið eru vorðin heimleys. (Sálmur 23:4)
16. Harri, vegleið leiðarar í Turkalandi og gev teimum vísdóm í hesi fíggjarligu, torføru tíð. Trot er á læknum, av tí at læknar flyta uttanlands av fíggjarligum ávum. (Esaias 30:21)
17. Gud, gev trúgvandi í Kirgisia møguleika at luta kærleika og sannleika Tín við vantrúgvandi, sum tey búgva ímillum. Harri, skap hungur og tosta eftir Tær og orði Tínum. (Ápostlasøgan 1:8)

18. Harri, verj kvinnur í Tadsjikistan, ið eru offur fyri harðskapi innanhýsis frá monnum sínum og verfamiljuni. Broyt hjørtuni á monnum, sum ikki virða kvinnur. (Esaias 60:18)
19. Faðir, signa, verj og samein kristnar familjur í Kirgisia, og ger tey før fyri at vera sterk í mótgangi. Hjálp konum at læra seg at biðja og at fasta fyri familjum sínum. (Orðtøkini 31:10)
20. Gud, hjálp okkum at náa kvinnur við evangeliinum, ið búgva í afturhalds sinnaðum samfeløgum í Katar. Lat tær koma at kenna Teg og síggja sanna virði sítt, ið tær eiga í Tær. (Efesusbr. 2:10)
21. Faðir, lat tey, ið umhugsa hjúnaskilnað í Turkmenistan, broyta hugsan og leita sær hjálp at endurnýggja hjúnalagið. (Hebrearabr. 13:4)
22. Gud, veit teimum, sum eru arbeiðsleys í Turkmenistan, hegni og førleika, ið er neyðugt fyri at tryggja teimum arbeiði, so tey kunnu forsyrgja familjum sínum. (Orðtøkini 16:3)
23. Faðir, gev okkara TWR Kvinnur við Vón toymum í Miðasia vísdóm, so tey kunnu hjálpa kvinnum, ið hava fingið fosturtøku, at finna grøðing og at bera góðu tíðindini um Kristus til fólk teirra. (Orðtøkini 2:6)
24. Harri, Gud okkara, lat tey trúgvandi í Usbekistan tæna Gudi heilhjartað og standa føst í trúnni hóast mótstøðu frá familjum sínum. (1.Korintbr. 15:58)
25. Harri, gev leiðarum í Karakalpakstan vísdóm at bøta um heilsutænastur, og at veita tær uttan kostnað. Lær kvinnur at duga á at skyna, nær tær skulu søkja læknahjálp heldur enn at viðgera seg sjálvar. (Orðtøkini 3:13)
26. Gud, lat einligar kvinnur í Turkalandi finna vón og áræði í Tær, sum tær royna at forsyrgja familjum sínum við avmarkaðum peningi. Øk um tað lítla, tey hava. (Fyrra Kongabók 17:13-16)
27. Harri, reis upp og styrk trúgvandi í Sameindu Arabisku Emiratunum, so tey í trúfesti bera evangeliska boðskapin til fólkið í hesi tjóð. (Rómbrævið 1:16)
28. Himmalski Faðir, gev einligum kristnum kvinnum í Kasakstan, ið ynskja at giftast og stovna gudrøknar familjur, trúgvandi gudsóttandi menn. (2. Korintbræv 6:14)
29. Faðir, verj kvinnur í Marokko, so tær kunnu koma saman trygt og í felag lesa og grunda á Bíbliuna, og lat tær vaksa andaliga og í tali. (Sálmur 32:7)
30. Harri, verj og styrk kvinnur í Algeria, ið eru undir samfelagsligum trýsti og mismuni. Lat tær finna styrki og dirvi í síni trúgv hóast atsókn. (Sálmur 46:2; ensk 46:1)
31. Gud, lat talgildu trúartænastuna hjá TWR Kvinnur við Vón í Norður Kypros, ið kallast *Bridge of Hope (Vónarbrúgvin)*, gerast ávakstrarmikil og hjálp teimum, ið eru neyðstødd. (Kolossebrævið 1:28)

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope**

**GUD RÆÐUR!**
**eftir Lisu Hall, altjóða bønarsamskipara**

Tað eru nógvar andsagnir í kristna lívinum. Ein av teimum er, at atsókn og trupulleikar ofta eru orsøk til, at Jesu Kristi samkoma veksur.

Tað er tað, ið okkara toymi TWR Kvinnur við Vón í Miðasia vænta, sum tey síggja økta mótstøðu móti kristindóminum, og í summum økjum eru avmarkingar settar teimum trúgvandi at savnast. Men ein av leiðarum okkara sigur við okkum við áræði: "Vit trúgva, at Gud ræður øllum, og vit vóna, at tað eggjar teimum trúgvandi at koma enn meiri saman í einleika, og at evangeliið verður útbreitt enn meira!"

Gjøgnum útvarpstól, sosialar fjølmiðlapallar, SD kort og geymar**,** eru sendingar okkara: *Kvinnur við Vón* og *Dýrabar og Elskað* náddar út til fólkið í Miðasia við bíbilskum innihaldi og praktiskum ráðum. Í sendingum okkara taka vit okkum av vanliga tørvinum hjá lurtarum, til dømis um barnauppaling, harðskap í parløgum, barnloysi, at hitta reis og mentanarligar trupulleikar, meðan onnur evni hava verið um kensluligar líðingar sosum misálit, skomm, skuldarkenslu og at verða avvístur.

Bíbliuundivísingin, sum tey lurta eftir, hevur eisini ávirkan, tí lurtararnir takka fyri stimbran og andaliga føði, ið tey fáa frá sendingunum.

"Eg kendi meg virðisleysa og óelskaða, og at eingin hevði brúk fyri mær; eg hugsaði, at eingin kundi hjálpa mær at broyta mítt lív," segði ein av lurtarunum frá. "Tó, lív mítt varð fullkomiliga broytt, tá ið eg fekk eitt radiotól og ein geyma við *Kvinnur við Vón* sendingum. Hesar sendingar søgdu mær, at Gud elskar meg, at Jesus doyði fyri meg, at Hann livir og kann umbroyta lív mítt. Nú, tá ið eg havi tikið ímóti Jesusi sum mínum Harra og Frelsara, veit eg, at eg eri dýrabara dóttir Hansara, og at Hann er góður og elskar meg."

Ein annar lurtari segði: "Eg búgvi í eini bygd, og her er eingin kirkja ella samkoma. Tí kenni eg meg so signaða, at eg kann lurta eftir útvarp**s**sendingum hvønn dag og vaksa andaliga."

Toymi okkara ávirka ikki einans Miðasia gjøgnum útvarpssendingar, men tey leiða eisini eina virkna bønartænastu, har fólk koma saman at biðja og biðja eisini gjøgnum bønarskriv. Tey fara eisini út til staðbundnar samkomur og ferðast til fjarskotnar bygdir, har tey stimbra tey trúgvandi í trúnni og at lesa Bíbliuna og biðja.

Kunnu vit biðja fyri djørvu TWR Kvinnur við Vón leiðarum, sum tær venda sær til okkara altvaldandi Gud, ið ræður yvir øllum? Tey biðja okkum um at biðja fyri teimum, at tey mugu fáa andaliga og likamliga styrki; fyri lógum, ið kunnu verja trúarfrælsi hjá kirkjum og samkomum, og fyri friði og støðufesti í londum teirra. Latið okkum saman bera tey fram fyri Harran.

***KVINNUR VIÐ VÓN*** **(twrwomenofhope.org)**
**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

## Fíggjarstuðul:

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145 til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio).**
**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR.**
**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**